# 3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

FRÓ›I LØKSÁGAR›

## Sting




### Brand New Day

Halló, hatta er ikki nøkur n‡ggj fløga! – hatta er óiva› hugsanin hjá onkrum sum sær hetta ummæli. Púra rætt! Brand New Day hjá Sting var útgivin einafer› seint seinasta heyst, men er framvegis rættuliga vi›komandi, og at síggja í hvørjari fløgubú› í landinum.

Brand New Day er 7. útgávan hjá Sting sí›ani The Police løgdu árarnar inn. Brand New Day er eisini ein rættuliga ambitiøs útgáva. Tónleikurin á Brand New Day er rættuliga ymiskur. Sting er á hesi útgávuni á eini heimsufatandi aldu av íblástri. Her er alt frá popptónleiki til heimstónleik, merktur av arabiskum tónum.

Lagt ver›ur út vi› vakra lagnum A Thousand Years sum fl‡tur yvir av fullkomnum vakurleika, og somulei›is fær lurtaran at hugsa. Sum eitt royal flush í poker, ver›ur hann sí›ani eftirfylgdur av Desert Rose, sum er ein filmisk duet millum Sting og frask-algeriska Cheb Mami. Lagi› vi› øllum sínum løgnu ljó›um og duldarfulla kenslu kennist rættuliga fullkomi›, og vísur eina n‡ggja sí›u av Sting.

Sting hevur eisini sín serliga humoristiska sans, sjálvt um hann í samrø›um vi› fjølmi›larnar og í sínum framfør›slum kann tykjast rættuliga sjálvhátí›arligur og nalvasko›andi. Humoristki sanskurin hjá Sting kemur rættuliga til sjóndar á løgum sum We'll See og Perfect Love... Gone Wrong. Á tí fyrra lagnum er eisini klarinettin hjá Brandford Marsalis at hoyra, og á tí seinna er ta› franski gestarapparin Che sum er serliga kryddi›.

Sjálvsama og hugtakandi røddin hjá Sting umframt eitt rock-steady bass spæl, eru ta› sum er berandi kreftirnar í heitislagnum Brand New Day, sum somulei›is var fyrsta single av útgávuni. Fyri tey flestu sum dáma Sting er ta› fløgan Ten Summoner's Tales frá 1993 sum er tann hægst metta útgávan. Men ta› er einki at ivast í at Brand New Day ikki stendur langt aftanfyri hesa, sjálvt um hon á ein hátt er rættuliga ólík. Men tó, tá ta› er Sting tú hevur vi› at gera, so eru nakrir lutir har sum kraftiga bo›a frá at talan er um Sting, líka miki› um tónleikurin er traditionelt spældur, ella forrita›ur. Hann heldur altí›! Keyp!!

## The Beach




### Soundtrack

N‡ggjasti filmurin vi› Leonard DiCaprio í høvu›sleiklutinum nevnist The Beach, og er hann at síggja í føroysku kykmyndahøllunum í hesum døgum. Eins og vi› einum hvørjum ø›rum filmi í dag, so er eisini ein fløga send á markna›in vi› tónleiki úr filminum.

Tónleikurin á The Beach, er ein víttfevndur vavstur av fyrst og fremst elektroniskum tónleiki framførdur av størstu nøvnunum innnan hetta øki. Sjálvt um ikki alt tilfari› á hesi fløguni er framleitt til høvi›, so má eg vi›ganga at ta› er alt rættuliga n‡tt fyri mær.

Ta› lagi› sum nokk hevur veri› mest at hoyrt til av hesi fløguni, er fína popplagi› hjá All Saints sum nevndist Pure Shores. Ta› er eingin annar enn framlei›arin hjá Madonnu, William Orbit, sum er tónlistarligi bakma›urin á hesum lagnum. Hetta hoyrist eisini rættuliga væl, og minnur lagi› í stø›um rættuliga nógv um okkurt av tilfarinum hjá Madonnu av hennara útgávu Ray Of Light.

Tann elektroniski tónleikurin á hesi útgávuni er fyrst og fremst umbo›a›ur av nøvnum sum Leftfield, Moby, Underworld, Faithless, UNKLE og gomlu gubbunum í New Order. New Order hava til hesa fløguna innspælt eitt n‡tt lag. Lagi› ta› nevnist Brutal, og er rættuliga væl umbo›andi tónlistarliga stílin sum New Order altí› hava lagt seg eftir. Ta› skal tó nevnast at hetta lagi› ikki er nakar n‡ggjur Blue Monday ella True Faith.

Á tí meiri rokkaligu sí›uni eru ta› Blur og Sugar Ray sum eru rá›andi, saman vi› gamla sangaranum úr The Verve Richard Ashcroft, sum saman vi› UNKLE luttekur á lagnum Lonely Soul. Samanumtiki› er hetta ein rímuliga víttfevnandi útgáva, vi› nógvum gó›um løgum. Fløgan er eitt gott keyp, serliga um tær dámar nútímans tónleik.

## Trisha Yearwood




### real live woman

Real Live Women er níggjunda útgávan hjá Trisha Yearwood, sum er ein av stóru songkvinnunum innan country tónleikin. Trisha Yearwood hevur altí› veri› sk‡rd av veri› ein kvinna vi› einum bo›skapi, tá hon hevur lati› frætta frá sær. Hetta eri eg av gó›um grundum ikki førur fyri at meta um, av teirri einføldu orsøk, at hetta er fyrstau fer› nakrantí›, at eg havi› veri› noyddur at lurta eftir eini úgávu hjá Trishu Yearwood.

Tá ein ikki er vanur vi› at lurta eftir country tónleik,i so er ta› eisini trupult at taka dagar í millum hvat fólk vi› áhuga fyri country tónleiki rokna fyri at vera gott. Har eru spurningar so sum: er hetta nóg flatt frambor›i›? og ikki minst, er hetta nóg syrgiligt? at taka stø›u til. Tá ein ikki er vanur vi› tílíkt, so er ta› skjótt til, at ein í leiklutinum sum ummælari fellur í ta› grøv, at gera vart vi›, at tá hetta ikki er naka› ein sjálvur dámar, so má hetta vera naka› verri hoyggj.

Ta› skal ikki vera gjørt her. Tá ta› helst eru fólk vi› áhuga fyri country tónleiki sum fáa gle›i av einum tílíkum ummæli so skal eg í einum positivum anda royna at koma vi› eini sakligari meting av tilfarinum hjá Trishu Yearwood.

Nøvn sum Faith Hill og Shania Twain hava sín uppruna í reindyrka›um country tónleiki, men sum árini eru gingin, hava tær valt at nærkast popp tónleikinum eitt sindur, og hava roynt at skriva› og framført sangir sum eisini appelera til vanligu popp áhoyrararnar.

Á hesi n‡ggju fløguni hjá Trisha Yearwood, er eisini okkurt sum bendir á, at hon er á somu lei› sum omanfyri nevndu nøvn. Hetta sæst kanska serliga tá hugt ver›ur eftir teimum sum hava lati› tilfar til útgávuna. Har eru fleiri nøvn sum ikki hoyra heima innanfyri bøgar›arnar í Nashville. Eitt nú Diane Warren, sum fyrst og fremst hevur gjørt seg galdandi innan fyri soul og R&B tónleik. Hetta er avgjørt ein fløga sum flestu country fjepparar fara at taka til sín. Heldur tú hinvegin at country tónleikur er fyri lastbilsjaførar og bygdafólk, so er hetta eitt vánaligt keyp



**Heitlufts-aggregat til flest øll endamál**

- Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
- Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
- Gasovnar
- Hitakanónir
- Avfugtarir

*Vit útvega eftir tygara tørvi!*

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**TVINGSILSSØLA**

**Hósdagin tann 25. mai 2000 kl. 09.00**

verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 54, Funningi.**

Ognin er eini sethús 46 m² til støddar í kjallara, stovu og loftshædd. Húsini eru gjørd úr timbri á betonggrund og takt við harðari tekju. Hjallur 16 m² og hoyggjhús 24 m². Grundøkið er 244 m² til støddar.

Húsini eru soleiðis innrættað:

Í miðhæddini er durur, wc og køkur/stova í einum. Á loftinum eru 3 kømur, baðirúm og gongd/trappuhol. Kjallarin er ikki innrættaður. Húsini eru bygd í 1990 í nýmótans sniði og tykjast at vera í góðum standi. Húsini er væl egnað sum frítíðarhús.

Sølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20000141),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2990

**Navn:** Sp/f Høgni
**Adressa:** Undir Gla›sheyggi 10, 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 06.04.2000
**Vi›tøkudato:** 06.04.2000
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 80.000,00 í ø›rum vir›um til kurs 100.
**Stovnari:** Høgni Reinert, Tra›arbrekka 22, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Høgni Reinert, Tra›arbrekka 22, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av einum stjóra.
**Grannsko›ari:** : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er keyp, søla og tænastuveitingar umframt onnur vinna, i› stendur í samband vi› nevnda rakstur.

Skráseting Føroya tann 8. mai 2000

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2995

**Navn:** Sp/f Kristjan Geyti
**Adressa:** 410 Kollafjør›ur

**Kommuna:** Kollafjar›ar Kommuna
**Stovningardato:** 01.05.2000
**Vi›tøkudato:** 01.05.2000
**Kapitalur:** Kr. 133.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 133.000,00 í ø›rum vir›um til kurs 100.
**Stovnari:** Ey›dis Andreasen, 410 Kollafjør›ur.
**Stjórn:** Ey›dis Andreasen, 410 Kollafjør›ur.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av einum stjóra.
**Grannsko›ari:** : P/F Rasmussen & Weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil og ídna› og a›ra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. mai 2000

Kristin Balle

## Ruddingardagar í Tórshavnar kommunu

Fríggjadagin 12. og leygardagin 13. mai 2000 verða ruddingardagar í Tórshavnar kommunu.

Rusksekkir fáast ókeypis á Skálatrøð fríggjadagin og leygardagin og við Róðrarneystið á Argjum leygardagin.

Feløg, skótar, ítróttarfeløg o.fl. fara at stuðla hesum tiltaki við at rudda hvørt sítt øki og verður burturkastið heintað av Tórshavnar kommunu. Onnur hava eisini møguleika at rudda frí- og felagsøkir, og verður hetta ruskið eisini heintað av kommununi.

Eisini verður høvi hesar báðar dagar at sleppa av við bilvrak o.a. við at venda sær til Brandstøðina, tlf. 31 48 81.

------------------------------------------------------------

**Sekkir (skiljing av ruski):**

Grønir sekkir: rusk ið kann brennast (pappír, óviðgjørdur viður, posar o.a.)
Klárir sekkir: rusk ið ikki brennur (glas, metal, dekk, gamalt hegn o.a.)

Dálkandi burturkast, so sum akkumulatorar, málning, imp. viður o.a., skal leggjast og avhendast fyri seg á Skálatrøð ella á Brennistøðini á Hjalla.

**Annað órudd:**
Órudd frá privatum húsarhaldum skal latast til Brennistøðina á Hjalla.

Opið er soleiðis:

Fríggjadagin kl. 08.00 - 20.00
Leygardagin kl. 08.00 - 20.00

**Ringjast kann til teknisku deild býráðsins (reinhaldið) á tlf. 31 55 13 í samband við ruddingardagarnar.**

*Tórshavnar kommuna*

*Lýsið í* **sosialinum**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2994

**Navn:** Sp/f HK-Flutningur
**Adressa:** 435 Streymnes

**Kommuna:** Hvalvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 12.03.2000
**Vi›tøkudato:** 12.03.2000
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 80.000,00 í ø›rum vir›um til kurs 100.
**Stovnari:** Hans Jákup Kollslí›, 435 Streymnes.
**Stjórn:** Hans Jákup Kollslí›, 435 Streymnes.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjóranum.
**Grannsko›ari:** : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fer›afólkaflutning, lastvognskoyring og handil vi› m.a. skrivstovuinnbúgvi og anna› virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. mai 2000

Kristin Balle

**P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ RASMUSSEN & WEIHE**

## Verkfrøðingur/ Byggifrøðingur

Fyri eitt byggifelag við heimstaði í Havn verður søkt eftir einum verkfrøðingi ella byggifrøðingi.

Tann, ið settur verður í starvið, skal arbeiða bæði á teknistovuni og úti á byggiplássum.

Arbeitt verður í tøttum samstarvi við leiðsluna, men tú skalt eisini kunna arbeiða sjálvstøðugt og, tá tað krevst, taka stig til at fremja tær neyðugu arbeiðsuppgávurnar.

Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. mai 2000 kl. 16. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at ringja til Rasmussen og Weihe, lokal 23.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PriceWaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail: rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

LÆRUPLÁSS Í ELDING • LÆRUPLÁSS Í ELDING

## Lærlingar
### til Elding í Runavík og Klaksvík

Til handlarnar í Runavík og Klaksvík søkja vit eftir lærlingi at byrja beinanvegin.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert lærupláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 25. mai 2000 og skal sendast til Elding í Runavík ella Elding í Klaksvík, alt eftir hvar tú vilt søkja:

**Elding í Runavík**
Heiðavegur
600 Saltangará

**Elding í Klaksvík**
Stangavegur
700 Klaksvík

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697